




Ólavsøkuframsýningin 2010:

# 103 VERK INNKOMIN

**Aftur í ár hevur stórur áhugi verið fyri at senda inn til Ólavsøkuframsýningina. Nevndin í Listafelagnum hevur fingið langt oman fyri hundrað myndir og verk undir yvirskriftini Toybil – tiðnar – tánar – ornar – bráðnar**

Eydna Skaale

Nú ólavsøkan stendur fyri durum, kann staðfestast, at 103 verk verða við á framsýningini. Verkinini eru eftir 38 listafólk, 16 menn og 22 kvinnur. Fimm sýna á fyrsta sinni fram á Ólavsøkuframsýningini, og tað verður saman við fleiri av fremstu listafólkum okkara. Framsýningin er á henda hátt framhald av gomlum siði, at leik og lærd, ung og tilkomin sýna fram lið um lið.

### Sjónbandaverk

Verkini umfata olju- og akrylmálningar, tekningar, seymaðar myndir og standmyndir úr glasi og plasti, stáli, steini og pappíri. Á framsýningini eru tríggjar installatiónir – uppstillingar. Fyri fyrstu ferð eru fleiri sjónbandaverk á Ólavsøkuframsýningini. Ofta hevur verið fregnast eftir, nær føroysk listafólk fóru at nýta sjónbandið. Sjónbandaverk hava verið at sæð nú og tá, men nú kunnu vit kanska siga, at listafólkini hava tikið henda formin til sín.

Evnið Toybil hevur verið gott. Øll verkini nema við tað, summi beinleiðis og summi meira óbeinleiðis. Fleiri verk lýsa tilgongdina, tá ið kavi ella ísur tiðnar ella sipa til hesa og aðrar tilgongdir í náttúruni. Nógv viðgera eisini avleiðingarnar av, at tað tiðnar, eitt nú tað spírandi nýggja lívið eftir kulda ella hvussu væntandi broytingar í hitalagnum fáa avleiðingar fyri bústaðirnar.

Uppstillingarnar lýsa til dømis gongd frá føstum til flótandi tilfar, hvussu tað flótandi ávirkar tað fasta og brigdi av tí, meðan onnur verk vísa til vísindaligu og listaligu avbjóð¬ingarnar, sum broytingar í náttúruni seta. Hetta eru listaligar viðmerkingar til viðurskifti í samtíð okkara, í náttúruni og í mentanini.

### Í Listaskálanum

Tað er Listafelag Føroya, sum skipar fyri framsýningini, og framsýningin er í tí partinum av Listasavninum, sum fyrr var Listaskálin. Listafelagið bygdi Listaskálan, sum var fyrsta hús, ið var bygt til listaframsýningar burturav. Hann var tikin í nýtslu í februar 1970.

Ólavsøkuframsýningin letur upp ólavsøkuaftan kl. 14. Ólavsøkudagarnar báðar letur framsýningin aftur kl. 20. Eftir ólavsøku er framsýningin opin til sunnudagin 8. august: mánadag-fríggjadag kl. 10-17, leygar- og sunnudag kl. 14-17. Atgongumerkini kosta 50 kr., og børn sleppa inn ókeypis. Atgongumerkið er eisini lutaseðil, og vinningurin er eitt listaverk fyri 5.000 kr. Drigið verður tann 8. august kl. 17.

*eydna@sosialurin.fo*

## Listafólkini eru:

- Amariel Norðoy
- Annika Hansen
- Arnold Vegghamar
- Astrid Mouritsen
- Ásla Rannvá Svensson
- Bárður Dal Christiansen
- Birgit Kirke
- Durita Dam
- Edward Fuglø
- Eigil Lyngsø
- Eli Smith
- Erla Dal Mørch
- Eyðun av Reyni
- Harriet Poulsen Vágadal
- Harry Knudsen
- Hergerð Joensen
- Ingi S. Jacobsen
- Jákubina H. Hansson
- Jákup Lervig
- Jóhan Martin Christiansen
- Johannes Nilssen
- John av Reyni
- Jonna Ljósá
- Josias Matras
- Jón Sonni Jensen
- Jóna Birgit Nattestad Olsen
- Jóna Rasmussen
- Jóna Kristin Thomsen
- Jórunn Dánialsdóttir
- Lorine Pimenta Martins
- Marianna Bjørgheim
- Marianna Mørkøre
- Marie Ravn Sørensen
- Marjun Jóannesardóttir
- Ole Wich
- Ragnhild Dam
- Rosa Birgitha Dal Christiansen
- Torfinn Jacobsen

## Situr dómin beinanvegin

Randi Jacobsen

Tá ið ein 27 ára gamal íslendingur 14. juli kom við flogfarinum úr Íslandi til Føroya, vísti hassjhundurin hjá tollvaldinum áhuga fyri manninum.

Maðurin varð fluttur á Landssjukrahúsið, har hann varð skannaður, og so var greitt, at hann hevði krógvað stóra nøgd av hassji innvortis.

Tað tók tríggjar dagar, til alt var komið út, og tað vísti seg at vera 116 gramm av hassji.

Hassjið var í 101 smáum posum, sum vóru fingrar av gummihandskum.

Maðurin játtaði seg beinanvegin sekan, og hann upplýsti, at ørindi hansara í Føroyum vóru at selja hassjið. Hetta var beint upp undir G!.

Dómurin var 50 daga fongsulsrevsing og forboð fyri at vísa seg aftur í Føroyum næstu trý árini.

Maðurin tók ímóti dóminum og vildi fegin sita dómin í Føroyum beinanvegin.

*randi@sosialurin.fo*